ALMANNAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS

Fylgiskjal 2

Fíggjarmálaráðið
Tinganes
Postrúm 2039
FO 110 Tórshavn

Dagur: 30. september 2020
Mál: 20/00823-2
Tygara mál: 20/00421
Viðgjørt: HP

Viðv. uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti

Almannamálaráðið hevur fingið uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti, til ummælis og hevur hesar viðmerkingar:

Gildiskoman í uppskotinum er dagin eftir, at lógin er kunngjørd og hevur virknað frá 1. januar 2020. Vit skulu gera vart við, at hetta kann fáa fíggjarligar avleiðingar fyri persónar, sum fáa veiting eftir § 13 í forsorgarlógini. Ásetingin stavar ivaleyst frá, at Almannamálaráðið áður hevur kunnað Fíggjarmálaráðið um, at ongin í løtuni móttekur veitingina. Men hetta er ikki longur støðan, og tað kunnu eisini vera aðrir persónar, sum fram til ársskiftið fara at fáa veiting eftir § 13 í forsorgarlógini.

Vit skulu heita á Fíggjarmálaráðið um at tryggja, at persónar, sum fáa veiting eftir § 13 í forsorgarlógini, hava rætt til frádráttin í 2020.

Vit skulu sostatt eisini gera vart við, at orðingin í viðmerkingunum til uppskotið um, at ongin persónur í løtuni móttekur veiting sambært § 13 í forsorgarlógini, eigur at strikast (bæði í almennu viðmerkingunum í pkt. 1.3 og í serligu viðmerkingunum pkt. 3.1).

Vit skulu fyri ein ordans skyld vísa á, at ásetingin um varandi veiting í § 13 í forsorgarlógini er flutt yvir í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, sum kemur í gildi 1. januar 2021. Persónar, sum móttaka hesa veitingina, fara tá at missa rættin til frádráttin, men samstundis hækkar veitingin, soleiðis at upphæddin eftir skatt og gjøld verður áleið tann sama sum í dag. Fyri at beina møguligar misskiljingar av vegnum kann Fíggjarmálaráðið umhugsa at taka hesa upplýsing við í almennu viðmerkingarnar.

Almannamálaráðið hevur ikki aðrar viðmerkingar til broytingina.

Vinarliga

Heri Petersen
fulltrúi